FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Postboks 208
110 Tórshavn

**Argir**, 11. november 2015

**J.Nr.:** 15/00526-3

**Tygara skriv:** 5/2015

## Fyrispurningur um fíggjarstøðuna, settur Kristinu Háfoss, landsstýriskvinnu (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

## Bjørn Kalsø, løgtingsmaður

1. Hvussu stórt roknar landsstýriskvinnan, at landskassahallið verður í 2015?
2. Hvussu nógv veksur hallið í 2015 orsakað av eykajáttanarlógini, sum landsstýriskvinnan stutt síðan hevur lagt fyri Løgtingið?
3. Hvussu nógv økjast rakstrarútreiðslurnar orsakað av nevndu eykajáttanarlóg?
4. Hvussu nógv økjast íløguútreiðslurnar orsakað av nevnda uppskoti?
5. Hvussu nógv økjast lógarbundnu útreiðslurnar orsakað av nevnda uppskoti?
6. Hevur uppskotið jaliga ávirkan á haldførið í búskapinum?
7. Heldur landsstýriskvinnan tað verða skilagott at økja um hallið á fíggjarlógini í einum frammanundan heitum búskapi?
8. Hvørji stig hevur landsstýriskvinnan í hyggju at taka til tess at venda gongdini, so avlop fæst á fíggjarlógini?
9. Hevur landsstýriskvinnan slept ætlanunum um at fáa javnvág ella yvirskot á fíggjarlógina í 2016?
10. Um ætlanir framvegis eru at fáa hallið burtur, nær kann so roknast við, at svørt tøl aftur verða at hóma í landshúsarhaldinum?

### Svar:

### Til nr. 1

Seinasta meting Fíggjarmálaráðsins er í Búskaparfreiðing II 2015. Úrslitið er mett til knappar 150 mió.kr. í halli. Fíggjarmálaráðið ger nýggja inntøkumeting í desember mánaða. Tá fæst ein nýggj meting av úrslitinum.

### Til nr. 2

RLÚ hallið á eykajáttanarlógini er 63,3 mió. kr. Av hesum eru 40 mió. kr. framskundað løgujáttan til Viðareiðistunnilin. Víst verður annars til løgtingsmál nr. 10/2015.

### Til nr. 3

Samlaði vøksturin innan rakstrarútreiðslur (rakstrar-, stuðuls-, lógarbundnar játtanir) er 3,4 mió. kr. (netto) Víst verður annars til løgtingsmál nr. 10/2015.

Kvíggjartún 1 • Box 2039 • FO-165 Argir
☏ (+298) 35 20 20 • 🖷 (+298) 35 20 25 • ✉ fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

**Til nr. 4**

Løguútreiðslurnar í uppskotinum til eykajáttanarlóg vaksa við tilsamans 52,8 mió. kr. (netto). Av hesum eru 40 mió. kr. framskundað løgujáttan til Viðarreiðistunnilin. Víst verður annars til løgtingsmál nr. 10/2015.

**Til nr. 5**

Lógarbundnu útreiðslurnar í uppskotinum til eykajáttanarlóg vaksa við tilsamans 3,2 mió. kr. (netto). Víst verður annars til løgtingsmál nr. 10/2015.

**Til nr. 6**

Mett verður ikki, at uppskotið til eykajáttan hevur nakra ávirkan á haldførið í búskapinum. Haldførið í búskapinum snýr seg um javnvágina millum inntøkur og útreiðslur hjá tí almanna yvir langt áramál og at almenna skuldin, sum frálíður, ikki verður somikið stór, at tað almenna ikki megnar at fíggja rentuútreiðslurnar av skuldini. Eykajáttanarlógir einstøk ár ávirka tí í sjálvum sær *ikki* haldførið í almenna búskapinum.

**Til nr. 7**

Mett verður ikki, at búskapurin verður stimbraður ella upphitaður av hesum uppskotinum til eykajáttanarlóg. Í uppskotinum til eykajáttanarlóg eru at kalla ongar útreiðslur til løgur ella rakstur, sum beinleiðis fara at stimbra búskapin í verandi støðu.

**Til nr. 8 og 9**

Landsstýrið fráboðar í komandi viku fíggjarpolitisk tiltøk, sum hava til endamáls at fáa avlop á aftur fíggjarlógina. Talan er bæði um tiltøk, sum fara at tálma útreiðsluvøksturin hjá landinum og sum fara at hækka inntøkurnar hjá landinum. Tiltøkini fara at ávirka fíggjarlógina fyri 2016 og árini frameftir. Tiltøkini fara eisini at hava við sær eitt javnari og rættvísari býti av virðunum í samfelagnum.

**Til nr. 10**

Landsstýrið miðar eftir, at landskassahallið verður burtur í 2016. Landsstýrið fer í næstum at leggja broytingaruppskot til fíggjarlógina fyri 2016 hesum viðvíkjandi. Landið hevur havt hall 8 ár á rað. Frá 2008-2015. Mett verður, at við verandi búskaparstøðu má og skal landið hava avlop. Hetta er neyðugt fyri at hava eitt trygt grundarlag undir føroyska vælferðarsamfelagnum og fyri at tryggja búskaparliga haldførið nú og framyvir. Harafturat vil avlop á fíggjarlógini fyri 2016 gera, at landið kann fara undir at rinda skuld aftur, heldur enn at økja skuldina, og at landið nærkast einum sjálvberandi og sjálvbjargnum búskapi.

**Kristina Háfoss**
*landsstýriskvinna*